

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 01 - 2012

# Føroysk fingramerki í Kalvklumpen boring

Føroyingar eru við bæði so og so, nú borurin aftur er settur í norsku undirgrundina. Talan er um leitimiðið Kalvklumpen miðskeiðis í Norðsjónum. Faroe Petroleum er við í hesum brunninum við 20%. Men eisini í fyristøðufelagnum, Det Norske Oljeselskab er føroyskt tilknýti. Maðurin á kassanum har er eingin minni enn havnarmaðurin Teitur Poulsen, sum er fíggjarstjóri í felagnum, ið eigur 40% av loyvinum. Hini feløgini eru Noreco við 20% og Bayerngas Norge við somuleiðis 20%. Brunnurin liggur nær feltunum Føj og Heimdal. Tað er pallurin Songa Delta, sum stendur fyri boringini.